## Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# PUBLIC SERVICE TIL SØLU

Allar ávaringarlampur á redaktiónini í Miðlahúsinum blunkaðu reytt, tá ein journalistur í Miðlahúsinum greiddi frá, at uttanríkisráðharrin hevði boðið viðkomandi á ferð til Washington saman við sær. Spurt varð, hvat Uttanríkisráðið mundi ætla og um, hví júst hesin journalisturin skuldi við. Hví Uttanríkisráðið ikki vendi sær beinleiðis til leiðsluna og so framvegis. At slíkt órógvar eina redaktión er eyðsæð.

Tað var eitt týðandi stig, tá vit fyri tveimum árum síðani fingu leiðreglur um góðan fjølmiðlasið. Fyrst og fremst eiga fjølmiðlarnir at brúka hetta sum eitt amboð, og verða leiðreglurnar virdar, er tað garanturin fyri trúvirði, integriteti og ábyrgd hjá miðlunum. Tí er tað serstakliga óheppið, at almenna Kringvarpið nú gongur á odda at niðurbróta tað trúvirði, sum eigur at vera ein náttúrligur partur í virkseminum hjá einum fjølmiðili.

Fyrsta reglan í leiðreglunum staðfestir, at tað áliggur øllum, ið starvast í fjølmiðlaheiminum, at vita, hvat er góður fjølmiðlasiður og at halda hendan sið. Undir petti 2.2. verður sagt: »Fjølmiðlafólk eiga ikki at átaka sær uppgávur, arbeiði, búskaparligar ella aðrar bindingar, ið kunnu skapa iva um, hvat endamálið er við kunningaruppgávuni. Tey eiga ikki at koma sær í støður, har ivi kann sáast um teirra trúvirði, og tey eiga at gáa um viðurskifti, ið kunnu ávirka gegnið hjá tí einstaka fjølmiðlafólkinum.«

Tvær sera grundleggjandi reglur um etisk virði, trúvirði og integritet, sum almenna Kringvarpið traðkaði á, nú Uttanríkisráðið beyð almenna stovninum við á ferð til ES-borgina, har hýrurin er góður, nú avtalan um gransking loksins varð undirskrivað. Tað er fullkomuliga líkamikið, hvørjar grundgevingar kringvarpsstjórin ella redaktionella leiðslan á stovninum koma við. Við at taka av innbjóðingini hevur Kringvarpið sett seg í eina støðu, har ivi kann sáast um teirra trúvirði. Líkamikið, hvussu góðar intentiónirnar við ferðini enn hava verið.



Skal trúvirðið hjá Kringvarpinum bjargast, eru bert eini ráð at taka: Gevið Føroya fólki og Uttanríkisráðnum boð um, at Kringvarpið rindar fyri útreiðslurnar! Kringvarpsstjórin staðfesti í tíðindasendingini í gjárkvøldið, at talan var um eina somikið týdningarmikla hending, at almenna varpið kortini hevði sent fólk avstað. Skal trúvirðið bjargast, má stjórin vísa, at talan var um meira enn innantómar undanførslur.

Munurin millum Kringvarp Føroya og okkara miðlar í Miðlahúsinum er, at vit takkaðu nei at fara sum einsamallur miðil á ferð við Jørgen Niclasen.

### Kringvarpið eigur at gjalda fyri trúvirðið

# Beinta roynir nýggjar leiðir



Húsið, virkishúsið fyri børn og ung, í Klaksvík skal hava nýggjan leiðara, tí Beinta Árnadóttir Gregersen hevur sagt seg úr starvi.

– Tað skal ikki skiljast sum, at eg eri móð av arbeiðinum. Hetta hevur verið eitt ótrúliga stuttligt arbeiði, og eg fái fyri hana og tey, neyvan nakrantíð nakað líka stuttligt arbeiði, sigur Beinta Á. Gregersen.

Hon hevur verið leiðari í Húsinum í fimm ár, og nú heldur hon, at best er bæði fyri hana og tey, sum koma í Húsið, at fáa nýggjan leiðara.

Tá ið hon sá lýsingina hjá fyritøkuni Kvasi eftir leiðara, søkti hon til stuttleikar – og fekk starvið.

Hon byrjar í nýggja starvinum 1. august, og uppgáva hennara verður m.a. at skipa fyri skeiðum.

– Tað verður spennandi at royna nakað so heilt øðrvísi, og hetta er verður mítt fyrsta veruliga starv á privata arbeiðsmarknaðinum, sigur Beinta Árnadóttir Gregersen, sum nú ger klárt at flyta til Havnar.

*randi@sosialurin.fo*



### Er Posta á deyðastrá?

JÁKUP DANIELSEN
KJAK Á SÍÐU 13



### Bert ein grundlóg í ríkinum

EDMUND JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 13

# Whitney í dýrastu neyð

*Houston, we have a problem.* Heimskenda songkvinnan Whitney Houston ferðast í løtuni runt í Europa og ger sær fyri skommum. Tann fyri so vakra og vælsyngjandi amerikanska songkvinnan er ikki tað, hon einaferð var. Tað er blivið staðfest allastaðni, har hon hevur hildið konsertir kring Europa. Í gjárkvøldið hevði Whitney Houston konsert í Keypmannahavn, og har vóru eisini føroyingar hjástaddir.

Donsku bløðini skriva, at hundraðtals áhoyrarar rýmdu av konsertini, tí framførslan var so vánalig.

– Eg fekk ilt í hjarta at síggja hennara niðurtúr frammanfyri øllum sínum fjepparum, segði ein áhoyrari við Ekstrablaðið.

Ummælarin hjá BT skrivar, at hann hevur ongantíð áður sæð so nógv fólk rýma undir einari konsert.

– Vit upplivdu eina tivandi, blásandi og forvirraða songkvinnu. Hon royni framvegis at sannføra seg sjálv um, at hon er størri enn lívið, men orsaka meg – halt kjaft, tað er trist, skrivar ummælarin. Hann gevur Whitney Houston eina av seks stjørnum fyri framførsluna.



Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo